# Reingerðarfólk til Kringvarp Føroya

**Kringvarp Føroya søkir eftir einum reingerð-arfólki til parttíðarstarv. Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna. Starvið verður sett frá 1. februar 2021 ella eftir nærri avtalu.**

## STARVIÐ
Uppgávurnar eru at halda bygningin reinan og ruddiligan innandura. Hølini eru ymisk og fevna m.a. um útvarps- og sjónvarpsstovur, upptøku- og redaktiónshøli, skrivstovur og gongdir. Arbeiðið verður gjørt í samstarvi við húsavørðin, og arbeiðstíðin er partvís uttan fyri vanliga arbeiðstíð.

## VIT VÆNTA, AT TÚ:
- hevur royndir við reingerðararbeiði
- vísir nærlagni í tínum arbeiði
- hevur áræði og arbeiðir sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni og ert fyrikomandi

## VIT BJÓÐA
Eitt fjølbroytt og áhugavert starv í einum góðum arbeiðsumhvørvi.

## SETANARVIÐURSKIFTI
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Havnar Arbeiðs-kvinnufelag.

## UMSÓKN OG FREIST
Send umsókn og viðkomandi skjøl í teldu-brævi til: umsokn@kvf.fo. Freistin er mána-dagin 25. januar 2021.

## FLEIRI UPPLÝSINGAR
Um tú vilt hava meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Thomas Kjelnæs, húsavørð, tlf. 29 66 05 ella teldupost thomas@kvf.fo

KRINGVARP FØROYA

Kringvarp Føroya er sjálvstøðugur almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini. Kringvarpsstjórin stjórnar stovninum við tilvísing til stýrið, ið telur 7 limir. Virksemið verður fíggjað við kringvarpsgjaldi og inntøkum frá kunngerðum og eydnuspølum. Kringvarp Føroya hevur 4 deildir, Aktuelt, Mentan, Tøkni og Fyrisiting, og umleið 80 fólk eru í føstum starvi á stovninum.